**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Heimarøktin*

## Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy

# Heilsuhjálparar

Søkt verður eftir heilsu-/heimahjálpara at arbeiða í Kvívíkar/-og Vestmanna kommunu at byrja 1. apríl 2006 ella skjótast til ber at arbeiða í blandaðum dag- og kvøldvaktum við starvsbrøki 20 tímar um vikuna.

Somuleiðis verður søkt eftir heilsu-/heimahjálpara at arbeiða sum avloysara í Kvívíkar/ og Vestmanna Kommunu at byrja skjótast til ber.

Vit kunna bjóða eitt spennandi starv í eini skipan, ið er í støðugari menning. Eitt starv, har tú bæði fer at virka í tøttum samstarvi við onnur og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Uppgávur tínar verða, umframt at veita handaliga hjálp, eisini at veita hjálp til persónliga røkt til heimabúgvandi pensjonistar.
Fyrimunur er, um tú hevur prógv sum heilsuhjálpari ella hevur royndir innan eldrarøkt.
Vit vænta av tær, at tú bæði hevur góð samstarvs-evnir og hevur áræði at arbeiða sjálvstøðugt.

Eru spurningar viðvíkjandi størvunum, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Kristbjørg Toftegaard, varaleiðara, á tlf. 422570.

**Setanar- og Lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina við setanarstað í Heimarøktini. Tænastustaðurin fyribils er Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy.

**Umsóknir:**
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum/arbeiðsváttanum verður at senda til:

Umsóknarfreistin er 6. mars 2006

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreym**
Økisskrivsstovan
Fo 370 Miðvágur
Att: Sonja Klein, økisleiðari

# Umsjónarfólk

Vestmanna Kommuna søkir hervið eftir umsjónarfólki til at byrja 1. apríl 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at umsita ávís økir og ognir hjá kommununi
- at leiða dagliga arbeiðið hjá kommununi
- dagligt viðlíkahald av kommunalum vatn- og kloakkskipanum
- rakstur av gøtuljósum
- at skipa fyri kavagrevstri
- viðlíkahald av vegum og gøtum
- rakstur av vatreinsiverki

**Vit vænta at tú:**
- hevur leiðsluroyndir
- dugir væl at samstarva við onnur
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur koyrikort
- hevur áhuga fyri tekniskum viðurskiftum

**Vit kunnu bjóða:**
- góða løn til rætta umsøkjaran
- møguleika fyri skeiðum innan arbeiðsøkið
- eitt fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg.

**Setanarniðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til Teknisku deild. Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**Vestmanna kommuna**
**Bakkavegur 16**
**FO-350 Vestmanna**

Umsóknirnar skulu merkjast »**Umsjónarfólk**«.

Eru spurningar, fæst meira at vita við at ringja á tlf. 470110. Vestmanna kommuna skila sær rætt til at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at seta.

Umsóknarfreistin er 3. mars 2006

**Deyvafelag Føroya**

Søkir eftir

# Skrivstovufólki

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**
- Dagliga gongdin hjá Deyvafelagnum og Deyvahúsinum.
- At fyrisita Deyvafelagið undir leiðslu av nevnd felagsins.
- At skipa fyri fundum í Deyvafelagnum.
- Samskifti Deyvafelagsins við almennu myndugleikarnar.
- Samskifti Deyvafelagsins við tænastuveitandi stovnar, t.d. viðv. Sjónvarp Føroya o.ø..
- Samskifti Deyvafelagsins við útheimin m.a. Norðurlandaráðið hjá Deyvum og Danske Døves Landsforbund.
- At savna tilfar til heimasíðu Deyvafelagsins – www.deaf.fo.
- At hjálpa leiðsluni (nevndini) í Deyvafelagnum at fyriskipa tiltøkum Deyvafelagsins.
- Dagliga samskiftinum við limir Deyvafelagsins.
- Innsavning til rakstur Deyvafelagsins.
- Dagliga rakstrinum (m.a. útleiguvirksemi) og viðlíkahald av Deyvahúsinum.

**Neyðug førleikakrøv og persónsmenska:**
Søkt verður eftir fólki, ið kann arbeiða sjálvstøðugt, hevur útbúgving og royndir innan vanligt skrivstovu-arbeiði, hava førleika til bókhaldsskipanina "Lundin" og annars røkja omanfyrinevndu uppgávurnar.

Men fyrst og fremst verður dentur lagdur á, at umsøkjarin hevur hug og hegni at seta seg inn í viðurskiftini teirra deyvu, at taka til sín deyvament-anina, at hava áhuga í at læra teknmál, og annars er sinnaður at brúka stóran part av orku síni at menna lívsvirði teirra deyvu.

**Arbeiðstíð og løn:**
Starvið er ¾-tíðarstarv, og verður arbeiðstíðin annars ásett í samráð við leiðslu Deyvafelagsins. Lønin er ásett sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ásvør Ellefsen á tlf.nr. 222 381.

Umsóknarfreistin er sett til 10. mars og verður at senda skrivliga til

**Deyvafelag Føroya**
Postboks 2001
FO-165 Argir






# Vit flyta

Í sambandi við at vit flyta, verður stongt hósdagin 23. februar og fríggjadagin 24. februar.

Vit lata uppaftur í nýggjum hølum á Óðinshædd 1 kj. mánadagin 27. februar 2006 kl. 08.00.

**Sp/f Foss-el**
Óðinshædd 1, kj.
Postboks 3266
FR-110 Tórshavn

**Eysturoyingar**

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 22. februar kl. 19.00**

**Tilmelding hjá:**
Hugo Kristiansen, tel 225225
Jari Lykke, tel 50 30 02
Ole Lykke, tel 220 972

**Eysturoyar Teoriskúli**



Sig tína meining
í Sosialinum